## Ov trongt hjá Lívdini

Samkoman Lívdin í Hoyvík er vaksin so nógv, at tey vóru noydd at finna sær onnur høli til møtini sunnudagar. Nu sunnudagin verður seinastu ferð, at samkoman hevur møti í Hoyvíkar skúla. Hereftir verða møtini hildin ikki so langt frá Hoyvíkar skúla. 14. februar verður nevniliga fyrsta møtið hildið í nýggja skúlanum við Løgmannabreyt. - Tað var vorðið ov trongligt í Hoyvíkar skúla, sigur Jógvan Zachariasen, pastorur í samkomuni við Rás2. Samkoman hevur havt ein góðan vøkstur av fólki, síðani møtini byrjaðu í 2001. - Nú eru vit komin í ta støðu, at samkoman ikki veksur, um vit ikki vaksa meiri um karmarnar, sigur Jógvan. Samkoman hevur annars í umbúna at byggja nýggjan bygning í Hoyvík. Bæði prosjektering og tekningar eru klárar, men bíðað verður eitt bil við byggingini, inntil fíggingin er í lagi.

## Minni skattur í Vestmanna

Vestmanna kommuna fekk nakað minni av skatti inn í januar mánaði í ár, í mun til í fjør. Í januar komu góðar tvær milliónir og 540 túsund krónur inn í skatti, ímóti tveimum milliónum og 500 túsund krónum í fjør. Hóast krónuupphæddin er størri, er kortini talan um eina afturgongd, tí á nýggjárinum skuldu vestmenningar gjalda eitt prosent meiri í skatti enn í fjør. Ein orsøk til lækkingina er óstøðuga arbeiðið á flakavirkinum í bygdini. Virksemið gjørdist at enda so lítið, at fólk vórðu send til hús. Ein onnur orsøk til lækkingina er hin einfalda, at fólkatalið í Vestmanna er lækkað hetta seinasta árið. Fyri einum ári síðani búði 1256 fólk í bygdini, men 1. januar í ár var talið lækkað til 1195 vestmenningar. Hinvegin verður víst á, at fleiri fólk eru flutt til bygdina henda seinasta mánaðin.

# Ruddaðu upp í sta

**Tað vóru 36 væl nøgdir luttakarar, sum í gjárkvøldið vóru liðug á snarskeiði í stavseting hjá Jonhardi Mikklesen, lærara á Læraskúlanum.**
**- Eg trúði ikki, at tað bar til at hava tað stuttligt og læra føroyska mállæru samstundis, helt ein av luttakaranum fyri**



*Jonhard Mikkelsen, lærari heldur eyga við hvussu tað gongur*

MÁL
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

»Hatta er eitt slag av bróstháldara«, slær ein myrkhærdur maður fast

Hinir nikka imponeraðir

Nei, tað snýr seg hvørki um silki ella blondir, men um bendingarmynstir og orðið »push-up« hesa løtuna í auluni á Læraraskúlanum, har 36 íðin fólk sita á staviskei í føroyskum

Lagið er gott kring sokallaða »mannfólkaborðið«, har eini átta mans sita og rætta stavifeilir í einum teksti. Hetta er sætta og seinasta kvøldið á skeiðnum og blýantarnir ganga títtir niður eftir tekstinum, har eitt ð verður strikað her, eitt komma sett inn har og so framvegis.

- Jú, nú gongur munandi frægari at rætta feilir, enn tað gjørdi í byrjanini, heldur ein fyri.

- Tað er eisini líka við, at man er farin at freistast at lesa bløðini við reyðum rættipenni í hondini, tí man sær knappliga stavifeilir allastaðni, sigur ein annar.

Ein av teimum, sum er við á hesum snarskeiðnum í føroyskari stavseting, er Joen Remmer, flogskipari.

Tá hann hoyrdi um skeiðið, var hann ikki í iva um, at hetta var júst nakað fyri hann.

– Eg vildi gjarna ruddað upp í mínum stavifeilur, til dømis ð og kommafeilir, tí eg skrivi rættiliga nógvar mailar hvønn dag. Og so haldi eg eisini, at tað at duga at stava, er nakað heilt grundleggjandi, sum man eigur at duga, sigur Joen Remmer.

Tað hevur heldur ikki bøtt um stavingina, at hann hevur búð niðri í 14 ár, og hesi árini stórt sæð ikki hevur skrivað føroyskt.

– Eg havi fleiri ferðir ætlað mær at gjørt okkurt við tað, men satt at siga havi eg ikki hættað mær undir mállærubøkur sjálvur. Tað fantastiska við hesum skeiðnum er at Jonhard Mikkelsen dugir so væl at greiða frá mállæru uppá ein ótrúliga einfaldan máta, so tú skilur tað.

Joen Remmer leggur afturat, at eftirhondini fer so nógv samskifti fram skrivliga, at brøv og teldupostar ofta eru einasta inntrykkið, tú hevur av fólki.

– Eg havi til dømis ongatíð sæð mín bankaráðgeva, sjálvt um eg haldi meg kenna hann væl gjøgnum teldupostar, smílist hann.

Tá teldupostar soleiðis kunnu blíva mátin, tú fatar ein persón, kanst tú byrja at stúra fyri, at títt trúvirði minkar í eygunum á øðrum, um tað, tú skrivar er fult av feilum heldur Joen Remmer.

Í skemtingarsama mannfólkahorninum hitta við Gunnar Mohr, sum er stjóri í íløgufelagnum 14.

– Eg kendi meg heilt einfalt ikki nóg vísan í, at tað, eg skrivaði var rætt stavað. Tað eru jú rættiliga nógv ár eftirhondini, síðani eg gekk í skúla, sigur Gunnar sum ikki ivaðist, nú møguleikin var fyri at fáa ruddað ringastu felirnar av vegnum.

Eisini Gunnar skrivar rættiliga nógv brøv í sínum dagliga starvi, og har er ikki "ráð" til at hava stavifeilir

Brøvini, eg skrivi í mínum arbeiði, skulu oftast vera stutt og sera neyv, og tá skal lítið til, áðrenn okkurt kann misskiljast, um málið er sløsut. Tú kanst heldur ikki vænta at verða tikin seriøst, um tað tú skrivar er fult av feilum, heldur Gunnar, sum er glaður um, at tað nú er eydnast at fáa flestu ð'ini uppá pláss.

Millum dámurnar hitta vit Eriku Lómstein Petersen, sum er skrivari á Íleguavninum. Har rættlesur hon nógvar tekstir umframt at hon skrivar nógvar fundarfrásagnir.

– Eg havi lagt merki til, at tað eru nøkur ting, sum

## Hava, vera, verða, blíva, fáa +ð

Tá ið orðini hava, vera, verða, blíva, fáa standa hjá sagnorði, endar sagnorðið við -ð

**Dømi:** hevur livað, er skrivað, fáa kvøðið, blíva bitið
Hetta sniðið við -ð verður við hvørt blandað saman við 1. persón eintal til dømis: *eg sitið, sum ivaleyst er smittað av sniðnum eg havi sitið.

**Reglan er henda:** stendur eg framman fyri sagnorði, fær sagnorðið ikki -ð.

**Rættilykil:** set inn dømd ella dømt